# City vil ikki av við Schmeichel

Danski málmaðurin, Kasper Schmeichel, sleppur ikki á liðið hjá Manchester City, har hann er sáttmálabundin, men enska felagið er heldur ikki sinnað at lata Schmeichel fara úr felagnum, har Gunnar Nielsen eisini er ein av málmonnunum. Manchester City hevur fingið trý boð upp á Schmeichel síðstu dagarnar, men City hevur noktað at selt.



# Spælarabussur stolin í Italia

Spælararnir hjá italska liðnum Reggiana fingu ein hvøkk, tá ið teir vaknaðu sunnumorgunin. Teir búðu á gistingarhúsi í Verona fyri ein landskappingardyst, og tá ið teir komu á føtur, var spælarabussurin stolin. Í bussinum lógu eisini spæliklæðini, so Reggiana mátti læna klæði frá Verona fyri at kunna spæla dystin.



*Oddmar Nielsen vann leygardagin sína fyrstu kapping, og kann nú kalla seg føroyameistara á 12 metrum*

# Oddmar Nielsen er ungdómsmeistari

Leygardagin var føroyameistarakappingin á 12 metrum hjá teimum yngru. Næsta vikuskifti kappast tey á 15 metrum.

12 børn luttóku í kappingini, ið varð hildin í kjallaranum í ítróttarhøllini í Runavík, har bogaskjótifelagið Ørvur heldur til.

At kappingin var í Runavík sá eisini út at seta síni spor. Heili 9 av skjúttunum vóru úr Ørvi.

Innleiðandi skutu bestu skjúttarnir langt undir tað, sum tey vanliga klára. Besti skjúttin, Oddmar Nielsen, fekk bert 480 stig, sum er langt niðan fyri tað, øll trý tey fremstu vanliga fáa.

Tá komið var í finalurnar broyttist eitt sindur, og bestu skjúttarnir fóru frá hinum. Í fjórðingsfinalunum vunnu fýra teir bestu skjúttarnir sínar dystir rættiliga trygt, so lagt var upp til nakrar áhugaverdar semifinalur.

Tær blivu eisini rímiliga javnar, og endin varð, at Sirið Rein og Oddmar Nielsen skuldu skjóta um føroyameistaraheitið, og Odd Andreassen og Jógvan Olsen skuldu skjóta um triðja plássið.

Bronsudysturin gjørdist ongantíð veruliga spennandi, tí Odd Andreassen vísti nú skjóting, ið hann plagar at hava. Men Jógvan Olsen, sum er rættiliga nýggjur í kappingum, hevur rós uppiborið fyri sítt íkast. Hann fekk eisini persónligt met í kappingini.

Gulldysturin millum Oddmar Nielsen og Sirið Rein skuldi blivið ein spennandi dystur, og skjótingin hjá báðum var rættiliga góð, líka til Sirið Rein bert fekk fimm stig fyri ein píl. Eftir tað koyrdi Oddmar Nielsen tað heim, og kann nú kalla seg føroyameistara á 12 metrum, eftir at hava vunnið við 104 stigum ímóti teimum 97 hjá Sirið Rein.

eij.

# Favorittarnir vunnu FM

**Jógvan Niclasen og Hans Petur Højgaard hava víst bestu og javnastu skjótingina yvir allan veturin, og hóast skjútar eru, ið kunnu hótta teir báðar, ávikavist í compound og recurve, so mátti teir metast sum favorittar til føroyameistaraheitið. Hetta livdu báðir upp til**

BOGASKJÓTING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hæddarpunktið í heimligu kappingini í innandura bogaskjóting er uttan iva føroymeistarakappingin. Í ár varð hon hildin í høllini á Giljanesi, og heili 23 skjúttar luttóku. 10 í compound og 13 í recurve.

Hóast Jógvan Niclasen og Hans Petur Højgaard hava verið bestu skjúttarnir í ár, so eru fleiri skjúttar, ið hava hótt teir báðar, og kappingarnar eru bara vorðnar javnari, sum veturin hevur liðið.

## Compound

Tá innleiðandi kappingin í Compound var liðug, vóru tríggir skjúttar, ið vóru ein flokk hægri enn hini. Jógvan Niclasen, Magnus Andreassen og Kaj Johannesen høvdu millum 573 og 568 stig av 600 møguligum. Hetta er sera góð skjóting.



*Hans Petur Højgaard vann enn eina ferð føroyameistaraheitið í bogaskjóting. Honum næstur var Eirikur í Jákupsstovu. Báðir eru úr Ørvi. Á triðja plássi endaði Torfinn Hansen úr Vágaskoti*



*Jógvan Niclasen er framvegis sterkasti compoundskjúttin í Føroyum*

Sterkasti skjúttin aftan fyri teir, var Sigrid Vang við 560 stigum. Hon hevur framvegis ikki játta, at hon verður við til Oyggjaleikirnar, har hon annars hevur vunnið nógv heiðursmerki fyri Føroyar.

## Fjórðingsfinalur

Í kvartfinalunum vóru tað framvegis hesir tríggir skjúttar, ið vístu sterkastu skjótingina, sum var á høgum støði, men nú kom Nikkel Petersen eisini upp í leikin, og koppaði Sigrid Vang við 115 stigum ímóti 111. Í hinum dystunum vann Jógvan Niclasen á Rakul Dam, sum er mamma hansara, við fýra stigum. Kaj Johannesen koppaði veteraninum, Alberti Dam, við fimm stigum og Magnus Andreassen vann bert við tveimum stigum á Hans Asbjørn Eysturdal, sum fyri kortum hevur fingið ein boga, ið passar til hansara.

## Hálvfinalur

Í hálvfinalunum var veruliga lagt upp til sterka og spennandi skjóting, tá allir fýra skjúttarnir skutu sera javnt í umfarinum frammanundan.

Hetta vísti seg eisini at verða til veruleika, men Nikkel Petersen livdi ikki upp til umfarið frammanundan, og so var laga manni hjá Jógvani Niclasen at skjóta seg í finaluna. Hann vann við heili sjey stigum, sum er rættiliga nógv, tá komi er so langt áleiðis.

Í hinum dystinum skutu Magnus Andreassen og Kaj Johannesen. Hetta bleiv ein heilt javnur dystur, har nummar 10 í heiminum, Magnus Andreassen, megnaði at vinna við tveimum stigum.

## Finalur

Í bronsudystinum megnaði Nikkel Petersen aftur at finna góðu skjótingina fram, og eftir ein javnan dyst vann hann við tveimum stigum á Kaj Johannesen, har luftin sýntist at vera farin úr balónini.

Í gulldystinum gekk sera javnt á, og tá seinasta umfarið skuldi byrja var bara eitt stig, ið skilti skjúttarnar. Men tá vísti Jógvan Niclasen, hví hann framvegis er sterkasti skjúttin í landinum, tá hann fekk 30 stig, sum er tað mesta, ið til ber at fáa. Magnus Andreassen megnaði ikki at fylgja við, og fekk til hansara stóra vónbrot bara 27 stig.

Tískil staðfesti Jógvan Niclasen enn eina ferð sína støðu sum sterkasta compoundskjútta í landinum.

## Recurve

Í innleiðandi recurvekappingini var bara Hans Petur

# Torfinn Hansen ársins skjútti

**Ársins skjútti hjá teimum vaksnu bogaskjúttunum hevur ikki verið valdur í fleiri ár, men í ár vóru fleiri um boðið, til at fáa henda stóra heiður. Endin varð, at bogaskjótideildin valdi Torfinn Hansen úr Vágaskoti fyri sítt arbeiði bogaskjóting at frama**

Millum orsøkirnar til, at hann varð valdur nevndi Schandorff Vang, formaður í bogaskjótideildini, at Torfinn Hansen ongantíð er bangin fyri at taka eina hond í, tá fyrireikast skal til kappingar og venjingar, og í gjár hevði hann longu koyrt alla útgerðina hjá Ørvi í bilin og var klárur at koyra til Runavíkar við henni, hóast hann býr í Vágunum, áðrenn heiðursmerkini vóru latin.

Nøkur onnur vóru eisini nevnd sum kandidatar til ársins skjútta. Magnus Andreassen fyri sítt frálíka tíggjunda plássi til HM, Annika Vang fyri sína luttøku í HM og fyri sítt arbeiði í Ørvi, Nikkel Petersen fyri síni úrslit í uttandura HM í Turkalandi og fyri sítt arbeiði í Ørvi, Jastrid Jensen fyri sítt áræði í Tambum og Jógvan Magnus Andreassen fyri alt sítt arbeiði bogaskjóting at frama. Men tá alt kom til alt, vísti tað seg,